# ítróttur

Nr. 89 • fríggjadagur • 13. mai 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo



*Í felags áheitan á aðalfundin verður skotið upp, at grein eitt í reglunum fyri FM í kappróðri verða broyttar soleiðis, at tað nú fer at standa, at FM kappingarnar skulu verða átta og ikki sjey*

# Vilja hava átta FM kappingar

**Bæði fuglfirðingar og Kappróðrarfelagið NSÍ vilja sleppa at fyrireika FM kappróður á hvørjum ári, og tað vilja tey hava RSF aðalfundin at taka undir við**

KAPPRÓÐUR
*Jóannes Hansen*

Fyrst vóru tað fimm FM kappingar. So øktist talið til seks, og fyri tveimum árum síðani samtykti aðalfundurin hjá Róðrarsambandinum, at tað í framtíðini skuldu vera sjey FM kappingar.

Tá ið seinasta samtyktin varð gjørd, var tað ikki sørt av turbolensi. Fleiri bjóðaðu seg fram, og inntil avgerðin varð tikin, var tað mangt, sum bendi á, at gamla skipanin við Fuglafjørður og Skálafjørðurin skuldu skiftast um at vera vertur, fór at detta niður fyri, og at í hvussu so er teir á Skálafjørðinum skuldu fáa FM kapping á hvørjum ári.

Úrslitið lagaði tað soleiðis, at Strendur/Skála og Vestmanna skuldu skiftast um nýggju FM stevnuna, meðan Fuglafjørður og Runavík framvegis skuldu skiftast um eina FM stevnu. Nú vilja Kappróðrarfelagið NSÍ og róðrardeildin hjá ÍF hava hetta broytt.

Í felags áheitan á aðalfundin verður skotið upp, at grein eitt í reglunum fyri FM í kappróðri verða broyttar soleiðis, at tað nú fer at standa, at FM kappingarnar skulu verða átta og ikki sjey.

### Luttakararnir skulu eiga avgerðina

Tá ið FM stevnu spurningurin varð viðgjørdur fyri tveimum árum síðani var nógv virksemi, og fleiri fulltrúir vórðu nýttar at atkvøða við fyri feløg, sum ikki møttu upp á aðalfundinum.

Nú vil Kappróðrarfelagið NSÍ hava aðalfundin at taka støðu til, um fulltrúir kunnu nýtast ella ikki.

Nevndin í RSF hevur eisini lagt fyri aðalfundin uppskot um at skerpa reglurnar fyri at atkvøða á aðalfundinum. Í grein fimm í ásetingunum hevur tað higartil staðið, at "eingin kann á aðalfundi umboða róðrarfelag, uttan at hava verið limur í felagnum í minsta lagi ein mánað, og uttan at hava limagjalds- og limaviðurskifti síni í lagi".

RSF nevndin skjýtur nú upp, at hetta verður lagt afturat: "Harafturat skal felag hava luttikið við í minsta lagi einari manning í tveimum FM róðrum undanfarna kappingarár".

Og so leggur RSF nevndin hetta afturat sínum uppskoti til broyting av grein fimm: "Á aðalfundi ber ikki til at atkvøða við fullmakt".

Í viðmerkingunum til uppskotnu broytingarnar sigur RSF, at nevndin heldur tað vera skeivt, at feløg, sum ikki luttaka í FM róðri á hvørjum ári, hava eins góð rættindi sum tey, ið eru við ár um ár. Nevndin heldur eisini, at tað er best, at feløg senda síni egnu umboð á aðalfund, heldur enn at onkur annar fær fulltrú at atkvøða.

### Møguleiki í ár

Tær sjey FM stevnurnar í ár eru hesar: Norðoyastevna 4. juni, Sundalagsstevna 18. juni, Jóansøka 25. juni, Varmakelda 2. juli, Fjarðastevna 9. juli, Vestanstevna 16. juli og Ólavsøka 28. juli.

Hannis Joensen, formaður í RSF, sigur seg væl skilja, at áhugi er at skipa fyri og harvið at kappast á fleiri stevnum. Trupulleikin er, at róðrarárið fevnir frá Norðoyastevnu og til Ólavsøku. Ofta fer Hvítusunnan, tá ið tað ikki verður kappróð, við einum vikuskifti eftir Norðoyastevnu. Soleiðis er tað ikki í ár, og Eystanstevnan, sum ikki telur í FM kappróðrinum, er løgd at vera 11. juni.

Tá ið eitt vikuskifti fer til Hvítusunnuna, so hevði einki vikuskifti verið leyst frá Norðoyastevnuni og til Ólavsøku, um átta FM kappingar høvdu verið á skránni, og tað skal viðgerast, um tað ber til, ella um tað skal altíð skal vera eitt vikuskifti til at taka, um talan verður um illveður ella at talan skal verða um umróður av øðrum orsøkum.

## Hava lopið ein aðalfund um

**Formaðurin í Róðrarsambandinum ætlar skjótt at leggja frá sær, og hann verður ikki ovfarin, um feløgini á aðalfundinum fara at sýna misnøgd við, at eingin aðalfundur varð hildin í fjør**

KAPPRÓÐUR
*Jóannes Hansen*

Hægsta vald RSF er aðalfundurin, sum verður hildin áðrenn 1. apríl, og skal verða fráboðaður feløgunum skrivliga og við lýsing í bløðunum minst ein mánað frammanundan.

Soleiðis ljóðar fjórða grein í ásetingunum fyri Róðrarsamband Føroya, RSF. 2. hvítusunnudag, sum er nú mánadagin ella 16. mai, verður aðalfundurin fyri í ár hildin. Tað man vera komið fyri bæði eina og fleiri ferðir áður, at feløg eru farin eitt sindur út um ásettu freistina, áðrenn aðalfundurin er avgreiddur. Men í RSF er tað merkisvert, at als eingin aðalfundur var í fjør.

Hannis Joensen greiðir soleiðis frá, tá ið vit spyrja, hvussu tað ber til:

- Tað er eingin umbering nóg góð fyri ikki at hava hildið aðalfund. Veruleikin er tann, at roknskapurin var ikki klárur, tá ið aðalfundurin í fjør skuldi verða hildin. So gekk tíðin, og tá ið fundurin ikki hevði verið undan kappróðrarárinum í fjør, so varð tað til tað, at hann ikki kom fyri fyrrenn nú í ár.

Roknar tú ikki við, at limafeløgini mánadagin fara at geva til kennar, at tey ikki eru nøgd við, at aðalfundurin ikki var í fjør?

- Tað hava tey allan rætt til at geva til kennar, heldur RSF formaðurin.

Seks limir eru í RSF nevndini. Sambært ásetingunum verða formaðurin og næstformaðurin valdir annaðhvørt ár av aðalfundinum at sita í tvey ár. Harafturat verða tveir nevndarlimir valdir annaðhvørt ár at sita í tvey ár.

Tá ið eingin aðalfundur var í fjør standa allir seks nevndarlimirnir fyri vali í ár. Fyri teir, sum áttu at staðið fyri vali í fjør, skulu limir veljast í eitt ár.

Kassameistarin, Dánjal Petur Poulsen, hevur boðað frá, at hann tekur ikki við afturvali. Tað hevur skrivarin, Sjúrður Gullbein, eisini gjørt. Tað vil við øðrum orðum siga, at í hvussu so er tveir nýggir nevnd-arlimir skulu finnast.

Formaðurin seinastu mongu árini, Hannis Joensen, boðaði longu í fjør frá, at hann ætlaði at taka seg burturúr nevndararbeiðnum. Nú sigur hann, at um feløgini ynskja tað, so fer hann at umhugsa, um hann skal verða sitandi í eitt ár afturat, men tað verður undir ongum umstøðum í meiri enn eitt ár.